## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í skrið av landnyrðingi og ælingur, sum frálíður kavi, men eisini onkur sólglotti. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og landnyrðingi og kavaælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitalagið um frostmarkið.

# Reyði Krossur ger barnagarð

TÍÐINDASKRIV



*Fátøk børn í Serbia fáa nú barnagarð frá Reyða Krossi í Føroyum*

Reyðkrossur í Føroyum stuðlar skúlaundirvísing av tvungnum barnahermonnum í Sudan. Serliga rættað til dreingir í aldursbólkinum, ið svarar til fimta til áttanda flokk her hjá okkum. Og pening til verjuleys børn í Zimbabwe, har mamman og pápin eru deyð av AIDS.

Hettar eru nøkur av tiltøkunum sum Reyði Krossur Føroya, við góðum stuðli frá limum og við innsamling í Føroyum, og í summum føri Føroya Landsstýri, hevur stuðlað seinastu árini.

Á aðalfundi sunnudagin greiddi Súni Vinther frá virkseminum hjá Reyða Krossi Føroya í 2007, har tað við takksemi bleiv víst á alt virksemið frá sjálvbodnum fólki, sum ger tað møguligt hjá Reyða Krossi at hjálpa víðari í heiminum, hjálpa børnum og øðrum neyðstøddum á teimum harðast ræktu økjunum.

»Í oktober høvdu vit eina landsinnsavning við bússum har vit gingu frá hurð til hurð, og hettar eydnaðis sera væl, við einum úrsliti upp á 450.000 krónur samlað. Harafturat kemur søla av brúktum bøkrum - har 16 sjálvboðin eru við og ikki minst endurnýtsluhandilin (har 26 sjálvboðin eru við). Tilsamans við einari sølu eina sølu uppá knappar 385.000 kr. Í hesum teljast eisini handil við øðrum tingum so sum jólakortum o.ø. Hettar er eitt sera gott úrslit«, stendur í ársfrágreiðingini frá Reyða Krossi.

Á aðalfundinum nevndi Súni Vinther at eitt av tiltøkunum »putlarir«, ið eru kvinnur úr øllum Føroyum, sum sjálvar sita og binda barnaklæðir og teppir, og sum verða send til ávís økir úti í heiminum. Hettar verður sent út í samstarv við Dansk Røde Kors. Í Tórshavn møtast nakrar av hesum putlarum ein seinnapart um mánaðin. Hetta tiltakið ger, saman við ørðrum virksemi, sum sjálvbodin hjálpa við, at Reyði Krossur kann gera ein mun við slagorðinum »Hjálpi okkum at hjálpa«.

Umframt uttanlandsvirksemið hevur Reyði Krossur Føroya í undanfarna ári havt eina vitjunartænastu og dagtilhald fyri heimleys.

»Vit kundi hugsa okkum eina virkna ungdómsdeild - URK (ein grein av Reyða Krossi Føroya), har ung millum 14 - 30 ár skipa fyri ymiskum tiltøkum. Hetta ynskja vit framyvir at gera meira burtur úr,« nevndi Súni Vinther, formaður.

Á aðalfundinum sunnudagin vóru tveir nýggir nevndarlimir valdir og tveir eykalimir. Nevndin í Reyða Krossi Føroya eru Súni Vinther, formaður, Anna Dahl-Olsen, næstformaður, Líggjas Joensen, kassameistari, og Kaja Nielsen og Jóna Mortensen, nevndarlimir. Eykavald eru Per N. Persson og Jákup Mørkøre.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 986 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer eystureftir og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. 06[00] – 27/3 06[00]. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. 06[00] – 27/3 06[00].
Avfallið higartil í apríl: 96 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 26. mars | Mánin longst frá jørðini |
| 29. mars | Seinna kvarter |
| 6. apríl | Tendring |
| 7. apríl | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1.apríl | 3:45 | 16:07 | 2:45 | 15:07 | 3:00 | 15:22 | 5:45 | 18:07 | 6:45 | 19:07 | 2:00 | 14:22 | 1:00 | 13:22 | 4:00 | 16:22 | 5:00 | 17:22 | 3:30 | 15:52 | 4:45 | 17:07 |
| 2.apríl | 4:28 | 16:49 | 3:28 | 15:49 | 3:43 | 16:04 | 6:28 | 18:49 | 7:28 | 19:49 | 2:43 | 15:04 | 1:43 | 14:04 | 4:43 | 17:04 | 5:43 | 18:04 | 4:13 | 16:34 | 5:28 | 17:49 |
| 3.apríl | 5:09 | 17:30 | 4:09 | 16:30 | 4:24 | 16:45 | 7:09 | 19:30 | 8:09 | 20:30 | 3:24 | 15:45 | 2:24 | 14:45 | 5:24 | 17:45 | 6:24 | 18:45 | 4:54 | 17:15 | 6:09 | 18:30 |
| 4.apríl | 5:51 | 18:12 | 4:51 | 17:12 | 5:06 | 17:27 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 4:06 | 16:27 | 3:06 | 15:27 | 6:06 | 18:27 | 7:06 | 19:27 | 5:36 | 17:57 | 6:51 | 19:12 |
| 5.apríl | 6:34 | 18:57 | 5:34 | 17:57 | 5:49 | 18:12 | 8:34 | 20:57 | 9:34 | 21:57 | 4:49 | 17:12 | 3:49 | 16:12 | 6:49 | 19:12 | 7:49 | 20:12 | 6:19 | 18:42 | 7:34 | 19:57 |

Alt um harmonikur



www.simme.eu